# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í baktarmi (anal krabbi)

## Sjúkueyðkenni við krabba í baktarmi

Krabbi í baktarmi kemur vanliga til sjóndar við lokalum sjúkueyðkennum
Illgruni um krabba í baktarmi skal íkoma, tá hesi sjúkueyðkenni íkoma:

- Bløðing frá endanum uttan aðra upplagda orsøk
- Pína í baktarmi
- Kensla av fyllu í baktarmi
- Inkontinens fyri skarni

  Minni vanligt er broytt opningsmynstur, skriði í baktarmi og sektretión úr baktarmi
  Hovnir eitlar i lærkreppuni eru i einstøkum førum einasta sjúkueyðkenni tengt at krabba í baktarmi

  Javnan eru klagurnar bert tengdar at óneyvum sjúkueyðkennum ísv. hæmoridur

Við illgruna til krabba í baktarmi skulu hesar kanningar gerast av ávísandi lækna

- Inspektión
- Rektal eksploratión
- Palpation av abdomen og lærkreppu (fyri hovnar eitlar)

## Ávísing til útgreining fyri krabba í baktarmi

Um illgruni er um krabba í baktarmi skal ávísing gerast til krabbaútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í baktarmi" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026